# Føroyskt við stíli á Gourmet

**Á mentanarnáttini bjóðar matstovan Gourmet gestum sínum fimm serstakar føroyskar/ norðurlendskar rættir**

MATMENTAN

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Føroyskar og norðurlendskar rávørur seta sín serliga dám á matskránna hjá matstovuni Gourmet á mentanarnáttini.

### Jákupsskeljar og rabarbusymfoni

Sjálva mentanarnáttina fer Gourmet at bjóða gestum sínum fimm rættir, sum allir hava støði í norðurlendskum og føroyskum rávørum. Møguleiki er at velja alla matskránna ella at velja einstakar rættir út.

***Matskráin á Gourmet mentanarnáttina sær soleiðis út:***
*Forrættur*
Ravioli, føroyskar jákupsskeljar við froða av turrum fiski.

Reyðsprøka við fennikel og marinadu av grønmeti

*Høvuðsrættur:*
Timian saltað oksakjøt, róturtrar og piparrótskrem.



*Føroyingar eiga at vera forvitnir eftir og ernir av gomlu føroysku rávørunum, heldur Leif Sørensen, kokkur og leiðari á matstovuni Gourmet*

*Ostarættur:*
Ostur, protvínsglaseraðar nøtur og oliventabinata.

*Dessert:*
Rabarbusymfoni við sjokolátu og hvonn

### Skúm av turrum fiski ...

Kokkurin og leiðarin á Gourmet, Leif Sørensen, heldur mentanarnáttina vera eitt frálíkt høvi hjá fólki at royna ymsar rættir við støði í okkara egnu mentan. Hann vísir á, at útlendingar rósa teimum føroysku rávørunum, tá ið tær verða rætt viðfarnar og bornar fram á rættan hátt og í stíl við rákið.

Sum dømi nevnir Leif Sørensen millimetur tunnar skivar av skerpikjøti, skúm av turrum fiski, kips av turrum fiski og ís av saltfiski. Hann heldur at føroyingar eiga eisini at vera forvitnir, áhugaðir og ernir av gomlu føroysku rávørunum, og síggja møguleikan í at vera heilt øðrvísi enn øll onnur.

# Oggi í »Ringrás«

**Tilverunar ringrás er evnið á framsýning hjá grafikaranum Oggi Lamhauge, sum letur upp í Stephanssons Húsi á mentanarnáttini**

LIST

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tilverurnar ringrás, ein ævig rørsla í tíð, har náttúran verður niðurbrotin og endurskapt, er bakgrundin fyri framsýningina »Ringrás« hjá grafikaranum Oggi Lamhauge, sum letur upp í Stephanssons Húsi á mentanarnáttini klokkan 15.

### Viðspæl og mótspæl

Við undran eygleiðir grafikarin og listamaðurin náttúrunnar ringrás og tulkar hana í prentmyndum við fokus á spenningsøkið millum skapan, niðurbrótan og endurskapan. Við prentmyndunum fer grafikarin út um tað tvívíddu flatuna og út á gólvið, har sjónarhorn hyggjarans broytist og samstundis gevur rúminum viðspæl og mótspæl.







*Tilverunar ringrás er evnið í prentmyndunum hjá Oggi Lamhauge í Stephanssons Húsi*

### Trúarsymbol

Oggi Lamhauge arbeiðir serliga við samtíðarlist við trárligum symbolum. Í 2006 fekk hann trý ara starvsløn, ið hevur givið honum møguleika at halga seg listina burturav.

Oggi Lamhauge er sera virkin á listarliga økinum, bæði her á landið og útlendis. Kendasta verk hansara er uttan iva altartalvan í Hattarvíkar kirkju, sum varð latin kirkjuni í 2001. Oggi hevur eisini gjørt serprent fyri stovnar og virki og undirvíst í tekning, máling og grafikki.

Listaframsýningin »Ringrás« letur upp mentanarnáttina, fríggjadagin tann 6. juni. Fernisering verður frá kl. 15.00 til 17.00